

# Rúsdrekkasølan skal lyftast upp á eitt hægri tænastustig

## Sølu- og tænastuleiðari søkist

Í sambandi við at Rúsdrekkasøla Landsins setur fokus á at menna tænastuveitingar sínar, verður lýst eftir leiðara at standa á odda fyri hesum arbeiði. Viðkomandi, ið settur verður, verður leiðari fyri sølu- og tænastudeildini, hvørs uppgáva er at tryggja eina góða tænastuveiting til allar viðskiftabólkar hjá Rúsdrekkasølu Landsins í samsvari við verandi lógarásetingar og strategisku ætlanina hjá fyritøkuni.

Viðkomandi skal duga at standa á odda fyri broytingum, vera við til at menna fyritøkuna á tænastuøkinum og fer at hava um hendi nógv samskifti við kundar og aðrar viðskiftabólkar. Í samljóði við endamálsorðingina um viðvirkan til tálming verður dentur eisini lagdur á øki sum ráðgeving, vegleiðing, upplýsing og fyribyrgjandi átøk, herímillum heimasíðurøkt, skeið um vørur okkara og kanningar.

Sølu- og tænastuleiðarin vísir til stjóran og verður partur av leiðslubólkinum. Handilsleiðararnir og goymsluleiðarin vísa til sølu- og tænastuleiðaran. Arbeiðið fevnir um nógvar tvørgangandi arbeiðsuppgávur, loypandi ad hoc uppgávur, íverksetan og verkætlanarleiðslu. Arbeiðsuppgávan er breið og fjølbroytt, og tí er neyðugt við góðari stýring og fokusering, og at ein dugir væl at tillaga seg.

### Uppgávu- og ábyrgdarøki á sølu- og tænastudeildini

- Sølubúðir og tænastuveitingar annars
- Samskifti og kunning, herímillum fyribyrgjandi átøk og branding
- Hagtalsviðgerð og hagtalskanningar
- Førleika- og tænastumenning

### Faklig førleikakrøv

- Akademisk útbúgving, t.d. Cand.merc. ella annar javntstillaður førleiki saman við viðkomandi leiðsluroyndum.

### Persónligur profilur

- Góð tænastuevni
- Menningarsøkin
- Góðar førleikar innan broytingarleiðslu
- Skipað og kreativt arbeiðslag
- Duga væl við fólki
- Góð leiðslu-, samskiftis- og samstarvsevni
- Dugnaligur sparringspartnari (coaching)
- Humor

### Setanartreytir

Setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

### Umsóknir

Umsóknir við avritum prógvum, CV og ummælum skulu í seinasta lagi 4. august 2008 sendast til Rúsdrekkasølu Landsins, att.: Elsa Maria Holm Olsen, Hoyvíksvegur 51, FO-100 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, vinarliga set teg í samband við Elsu Mariu Holm Olsen, stjóra, á tlf. 580 129 ella á emo@rusan.fo.

***Rúsdrekkasøla Landsins***
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*

SENDISTOVAN









**Skulu havamøblarnir skiftast?**
**Natúrtræhavamøblar eru svarið!**

Massivt natúrtræ, ið kann standa uttandura alt árið. Allir okkara møblar eru viðgjørdir, so at teir eru klárir til at seta út í havan beinanvegin.




**Sp/f H.S. Møblar** Á Sandvíkarhjalla | tel 31 47 83 | far 21 47 83 ella 59 89 31